

## Hollywood er heimavøllur

Leirvíkingur Hans Fróði Hansen ferðast í Los Angeles sum var tað hansara egni heimstaður. Hann hittir stjørnurnar til veitslur og skal nú samstarva við eina heimskenda poppstjørnu um eina nýggja ætlan. Hvussu er lívið í Hollywood, og hvussu kunnu føroyingar røkka so langt? Vit spyrja, og Hans Fróði Hansen svarar



## Ragnar spælir live

Ragnar Finnson, sum tók alt Danmark á bóli í kappingini Talent, fer at spæla live á Hvonn. Ragnar hittir eisini Peter Aalbæk og hevur eina óvanliga avbjóðing til Aalbæk.



## Rockrøddin sum hvarv

Í fleiri ár var hann ein tann besta og mest markanta røddin í Útvarpinum. Men so bráðtagnaði hann, og seinnu árini hevur einki verið at hoyrt til hann. Vit leita á slóðina og finna fram til útvarpsmannin Heðin Arge og fáa greiði á, hvat hann tekst við nú.



## Hví drepa føroyingar ikki hvønn annan?

Føroyingar drepa ikki hvønn annan við vilja. Síðani 1988 er bert eitt dráp skrásett í Føroyum, meðan í øllum okkara grannalondunum eru dráp púra vanlig. Vit royna at finna fram til eina frágreiðing um, hví føroyingar ikki drepa hvønn annan við vápnum.



## Durita vil føra skip

Durita Christophersen úr Vestmanna líkist ikki týpiska skiparanum, men hon er í holt við at taka útbúgving sum skipsførari. Prátað verður við hana um hennara val av útbúgving, og hvat hon ætlar sær, tá ið hon einaferð kann taka ræði á brúnni á skipum.

